# – Fløgan er ein æra fyri meg

**– Henda fløgan hjá Kára Bæk er so mikið góð, at hon eigur at fáa eitt heiðurspláss í føroyskum tónleiki, sigur tónasmiðurin, Sunnleif Rasmussen um nýggjastu føroysku fløguna**

TÓNLEIKUR
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

Tað koma nógvar føroyskar fløgur út millum ár og dag. Góðskan á hesum er ójøvn, men av og á kemur út ein fløga við høgari góðsku.

Ein slík fløga kom tó út í gjár við verkum eftir tónasmiðin Kára Bæk í Kvívík. Fløgan kallast "Afturundirgerð" og er ein samling av fimm verkum, sum eru skrivað í tíðarskeiðnum frá 1996 til 2001.

Tað er bólkurin "Aldubáran", sum hevur spælt hesa fløguna inn í Vesturkirkjuni, Norðurlandahúsinum og í Århus. Og Kári Bæk kundi bara fegnast um góða úrslitið.

- Tað er ein æra fyri meg, at júst Aldubáran hevur spælt inn hesa fløguna við mínum verkum.

- Eg vóni bara, at tey fara at halda fram við sama tátti, við at spæla verk hjá øðrum føroyskum tónasmiðum, segði Kári Bæk við framløguna í gjár.



*Teir báðir hava spælt mong verkini saman. Í gjár fingu Jóhanes Andreasen á klaveri og Jógvan Zachariasen á bassoon høvi at framføra eitt verk eftir føroyska tónasmiðin, Kára Bæk*



*- Tað er ein æra fyri meg, at júst Aldubáran hevur spælt inn hesa fløguna við mínum verkum, sigur Kári Bæk, nú nýggja fløgan kom út í gjár*

**Afturundirgerð**

- Eitt fyribrygdi í náttúruni. Tað er eitt rák inni við land í einum sundi, ið rekur móti høvuðsrákinum longur úti í sundinum.
- Afturundirgerðin verður so við og við sterkari, og verður til høvuðsrák fram til næstu kyrrindi. Har sum hesi bæði rákini renna saman verður sjógvurin óslættur og íður koma.

Tað er plátufelagið Tutl, ið gevur fløguna út.

### Tolin trívst

Ein annar, sum somuleiðis fegnast um nýggju fløguna, er tónasmiðurin Sunnleif Rasmussen. Hann metti alla fløguna sum hon var sum eitt meistaraverk.

Hann var ikki sørt bilsin yvir, at tað ber til at fáa eina so góða fløgu við føroyingum og av føroyingum útgivna í Føroyum.

- Her er góður tónleikur, góður klangur, góðskan er høg, spælið er gott og upptøkurnar góðar, sigur Sunnleif.

Fyri hann er eingin ivi um, at Kári Bæk er ein meistari í timing. Hetta er ein eginleiki sum er sera hentur hjá øllum tónasmiðum.

Teir kunnu ofta brúka fleiri mánaðir við bara at skriva 10 min. av tónleiki, og aðrar tíðir eina heila viku til at skriva neyðars 2 min. av tónleiki.

- Hetta tolið eigur Kári, og tað hoyrir tú eisini sera væl á hesi fløguni. Meðan tú lurtar eftir henni, keðir tú teg ikki eina einastu løtu, men tú verður líkasum førdur fram í tónleikinum, sigur Sunnleif.

Hann heldur tí eisini, at heitið á fløguni er sera væl valt: At skriva, og ikki minst framføra, nýggjan og góðan tónleik metir hann sum eitt nýtt rák, sum yvirhøvur fer ímóti høvuðsrákinum í tónleikinum. Seinni gerst tað ein partur av høvuðsrákinum, og tá er nógv vunnið.

### Eigur heiðurspláss

At ein føroysk fløga kemur út við klassiskum føroyskum tónleiki og føroyskum tónleikarum er einki minni enn ein stórhending.

- Tað tykist sum um gáttin fyri at geva út føroyskar fløgur er í lægra lagi. Tað vísir seg, at mong kunnu geva eina fløgu út, sum mangan fær sera stóra útbreiðslu.

- Men her hava vit so eina fløgu, sum í øllum førum gongur ímóti hesum streymi: Her er bæði góður tónleikur, gott spæl og góðar upptøkur. Tí eigur henda fløgan so avgjørt at fáa eitt heiðurspláss í føroyskum tónleiki. Tað hevur hon avgjørt uppiborið, sigur Sunnleif Rasmussen.

Tónleikararnir á fløguni eru fyri ein stóran part føroyingar. Teir eru: Andrea Heindriksdóttir á floytu; Kenneth Larsen á klarinett; Jógvan Zachariassen á bassoon; Páll Sólstein á horn; Øssur Bæk, Sámal Petersen og Rúni Bæk á violin; Ida Nørholm á cello; Ólavur Jakobsen á guitara og Jóhannes Andreasen á klaver. Stjórnað upptøkunum hevur Andras Olsen.

• • • • •

# Kvinnur úr 170 londum lata ljósið skína

**Altjóða bønardagurin fyri kvinnur verður í morgin hildin kring allan heimin. Í Føroyum verður hann hildin á trimum støðum: Í Havn, Klaksvík og í Vági**

BØNARDAGUR
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

ALTJÓÐA KVINNUBØNARDAGUR

*Altjóða kvinnubønardagurin hevur sítt serstaka búmerki. Her kann ein síggja at allar ættir møtast á sama staði, fólk í bøn, ein einfaldan keltiskan kross og ein rundíng, sum bindur menniskju saman í bøn*

Fyrsti fríggjadagurin í mars mánaði hevur í mong ár verið dagurin, tá kvinnur kring allan heimin og úr mongum ymiskum samkomum og kirkjum koma saman til bøn.

Soleiðis hevur eisini verið í Føroyum í mong ár, og nú bønardagurin stendur fyri framman aftur í ár, fara trý kirkju- og samkomuhús at standa opin fyri kvinnum, ið ynskja at biðja fyri landi og fólki.

Hesi trý støðini eru Oasan í Havn, Kirkjukjallarin í Klaksvík og Missiónshúsið í Vági, hagar øll eru vælkomin til uppbygging og bøn.

Eins og gjørt hevur verið undanfarin ár eru tað kvinnur úr ymiskum londum, sum skiftast at skriva eitt hefti við tekstum at lesa upp og við evnum at biðja fyri.

Í fjør vóru tað kvinnur úr Panama, sum skrivaðu hetta heftið, meðan tað eru kvinnur úr Polen, sum í ár hava staðið fyri hesum bønarheftinum. Næsta ár skulu kvinnur úr Suðurafrika gera tema'ið fyri bønardagin.

Tær polsku kvinnurnar hava í ár valt at kalla bønardagin fyri "Latið ljósið skína", og verður hetta lýst við bíbliulesnaði, sangi, syndajáttan og talu. Og við fastari skrá verður bønardagurin tí hildin eins í øllum hesum 170 ymisku londunum kring heimin.

### Stuðla prosjektum

Hesar bønarkvinnurnar, sum í morgin møtast undir ymiskum umstøðum og á ymiskum støðum, verða ikki bert savnaðar til bøn. Tær savnast eisini til at stuðla ymiskum góðum ætlanum kring heimin.

Í fjør var savnað inn fyri einum kvinnuheimi á Madagaskar og til AIDS-arbeiðið í Zambia, og komu tá inn góðar 86.000 kr. bara úr Danmark til hetta heimið.

Í ár verður høvið at stuðla trimum ymiskum ætlanum: Einum prosjekti við gøtubørnum í Kenya, einum líknandi heimi í Letlandi, eins og møguleiki verður at stuðla bønarkvinnunum í Litavia, Ukreina og afrikanska landinum Malawi.

Til bønardagin í ár hevur ein listarkvinna úr Polen, nevnd Areta Fedak gjørt eina plakat. Við hesi myndini ynskir hon at vísa ljósið sum Guds umsorgan, heilagleikan og tað tvørkirkjuliga samarbeiðið, eins og ljósið er tekin um hita.

Millum sangirnar, ið sungnir verða í morgin verður tí heilt natúrliga sangurin "Gud, ger meg til eitt lítið ljós".

Í Havn og í Vági møtast kvinnurnar kl. 19:30, meðan tær møta kl. 20 í Klaksvík.

## Kjaktorg steðgar

**Strendur:** Tað skuldi vera so gott, men kjaktorgið hjá Sjóvar kommunu gjørdist ikki til tað, sum kommunan sjálv ætlaði. Tað vísti seg kortini, at alt ov nógv brúktu henda alt ov góða møguleikan til at skriva og tjakast alt ov nógv um alt ov nógv óneyðug viðurskifti.

Tá kommunustýrið gjørdi av at hava eina kjaksíðu á heimasíðuni hjá kommununi, var ætlanin, at borgarin skuldi hava møguleika at føra sakligt og viðkomandi kjak á heimasíðuni. Men eftir at síðan hevur virkað eina tíð, hevur tað víst seg, at innleggini á kjaksíðuni alt ov ofta vóru dulnevnd og haraftrat í rættiliga stóran mun eisini ósaklig.

- Tí hava vit gjørt av, at kjaktorgið hjá Sjóvar kommunu verður tikið av, sigur Malena Thomsen, borgarstjóri á Strondum.

**sb.**